# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Margit Midjord 80 ár



Margit Margretha Adelheid Midjord varð borin í heim á Geilini í Fuglafirði hin 29.11.1924, og gjørdist sostatt 80 ár hin 29. november. Foreldrini vóru Christian og Nicolina Thomsen, bæði úr Fuglafirði. Tey vóru 6 systkin: Mary Cruse, ið er gift til Onglands, Solby Olsen, ið varð gift til Klaksvíkar, Noomi Joensen, ið er gift til Saltangará og Símin Hendrik Thomsen, ið er giftur og býr í Fuglafirði. Ein beiggi doyði sum pinkubarn.

Sum blaðung fór Margit til Klaksvíkar at tæna, og har var hon eisini í mong ár. M.a. arbeiddi hon sum køksgenta á sjúkrahúsinum og seinni á vaskaríinum og á hermetikkfabrikkini. Margit flutti aftur til Fuglafjarðar, og í 1957 giftist hon við Sivardi Midjord. Tey bygdu hús norðuri á Høvda tætt við gomlu Høvdahúsini, sum var barndómsheimið hjá Sivardi. Sivard, sum var sjómaður øll árini, doyði í 1989. Margit eigur ein son, tvey ommubørn og ein langommuson.

Ikki sæst á Margit, at hon hevur verið álvarsliga sjúk, tí hon er bæði løtt røsk og - satt at siga hevur hon prátingarlag og fimi sum eitt ungfólk. Annars dámar Margit væl handarbeiði, og hon hevur bundið eina ørgrynnu av troyggjum og hosum. Henni dámar eisini væl í urtagarðinum, og hevur hon verið við til at røkja hann so mikið væl, at hann í 2002 vann eitt 3. pláss í urtagarðskappingini hjá Fuglafjarðar Kommunu.

Margit dámar eisini væl at lesa - gjarna stutt- og skaldsøgur - men hon ger eisini nógv fyri at halda seg kunnaðan við vikubløðum og avísum. Tað er altíð hugnaligt at koma inn á gólvið hjá Margit; hon eigur altíð ein góðan kaffimunn, og tað liggur væl fyri hjá henni at siga frá gomlum døgum, og hvussu ymisku viðurskiftini vóru tá.

## Michael Müller 50 ár



Hósdagin 2. desember verður ein kendur havnarmaður, ella sum vit plaga at siga, ein "landavegsfressur", 50 ár.

Michael hevur fingist við mangt og hvat hesi 50 árini, men mest kendur man hann tó vera sum bátasmiður. Eftir lokið studentsprógv fór Michael at arbeiða í "imprægneringini" hjá Balslev undir Svartafossi. Í hesum arbeiði kom hann at kenna tann kenda bátasmiðin úr Fugloy, Jógvan Hansen, sála. Hjá Jógvani kom Michael at standa í læru sum bátasmiður, og arbeiddi hann hjá honum í nøkur ár.

Í sínum yrki sum bátasmiður er Michael komin víða um. Hann hevur smíðað bátar bæði í Føroyum og uttanlands. Jú hendurnar eru skrúvaðar rætt uppá mannin, tað kunnu vit øll verða samd um.

Millum vinir er Michael kendur sum tann ið altíð er fastur fúsur at skipa fyri bæði einum og øðrum, tað veri seg veitslum, uttanlandsferðum, túrum her á okkara egnu oyggjum og mongum øðrum skemtiligum tiltøkum.

Michael hevur eisini altíð dugað væl við konufólki; tær eru ikki so fáar sum fáa stjørnur í eyguni, tá navnið á honum verður nevnt. Hatta smílið og so hasi eyguni eru ikki at koma uttanum. Jú, sjarmør um ein háls hevur hann altíð verið.

Mangt annað kundi verið at sagt frá, sum Michael saman við hinum landavegsfressunum hevur verið uppií, men lat fara; tað ber ikki til at nevna alt her, tí nógv av tí er ikki fallið fyri "fyrningarfreistini" enn.

Vit landavegsfressar ynskja tær hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum og góðan byr framyvir.

Heilsan

**Fleiri landavegsfressar**

### Minningarorð um

## Birgir Nónsgjógv

Komin til arbeiðis í morgun bórust mær døpru og syrgiligu tíðindini um, at bygdarmaður og góði vinur mín Birgir var deyður, bert 51 ára gamal. Sum altíð tá slík tíðindi berast kemur hetta dáttliga við og tíðin steðgar á - tú skilir ikki, ella vilt ikki góðtaka syndarliga veruleikan.

Seinast vit báðir Birgir hittust var næstseinasta leygardag. Eg hevði saman við synunum verið eftir harum og hitti Birgir Uppi undir Brekkum. Lítið grunaði tað okkum, at hetta varð seinastu ferð at vit skuldu práta saman. Tilvildin hinvegin vildi tað soleiðis, at her oman fyri garðarliðið, í fagrasta vetrarveðri - við útsýni yvir ta bygd vit høvdu slíkan tokka til - skuldu vit hittast seinastu ferð. Her, við fagra útsýninum yvir bygdina, sum lá í fagrasta vetrarskrúð, við høgu fjøllunum og Kallsoynni í baksýni og skoðandi út á Norðhavið, alt meðan sólin sendi sínar geislar millum Tyril og Middagsfjall, fingu vit báðir soleiðis okkara seinasta prát. Hendan løtan var okkara og í tíðini sum kemur, verður tað gott at kunna knýta seinastu minnini um Birgir, at vøkru myndini hendan leygarmorgun.



Birgir var sum altíð glaður og smílandi. Hansara hugsan við hesum, hansara seinasta harutúri, var ikki at fáa størst møguliga veiðu. Hugsanin við túrinum hjá Birgiri var, sum hann sjálvur segði tað, at fáa ein túr í hagan og kunna njóta løtuna í haganum, langt burtur frá dagliga degnum við sínum stríði og strevi.

Vit sum kendu Birgir vistu, at hann var ein arbeiðsrót fram um teir flestu. Ikki bara var hann so sera arbeiðssamur, tað lá eisini so ótrúliga væl fyri at arbeiða. Sama gjørdi hvat handaliga arbeiði var, hann var sum tikin úr leikum til tað. Sum ungur arbeiddi hann innan byggivinnuna, men hansara lívsstarv skuldi tó gerast innan flakavinnuna. Hansara hegni, kunnleiki til maskinur og hendinga arbeiðsevnir gjørdu, at hann varð biðin at koma til Norðis at arbeiða. Hesum yrki varð hann verandi í. Hesi seinastu nógvu árini arbeiddi hann við saltfiskaframleiðslu og seinastu árini var hann virkisleiðari á saltfiskavirkinum á Toftum. Hugsi ikki eg fari nógv skeivur tá eg sigi, at hansara størstu og bestu eginleikar í arbeiðslívinum vóru at síggja fram um dagin í dag og menna nýggjar skipanir innan framleiðsluna og soleiðis fáa meir burtur úr rávøruni og ikki minst gagnnýta størri partar av henni.

Ongin ivi er um, at hansara partur liggur ikki eftir, nú føroyskur saltfiskur er komin á ovastu rók og er millum best dámdu saltfiska-úrdráttir á marknaðinum. Besta tekin um hetta man vera, at tá hann fyri júst einum ári síðan helt fimti ára føðingardag, komu umboð fyri saltfiskakeyparar heilt frá londunum við Miðjarðarhavið til Gjáar at halda dagin saman við honum. Eitt greitt tekin um at arbeiði hansara varð virðismett, eisini uttanfyri landoddarnar og hevur borið fruktir!

Birgir hevði stóran tokka til bygdina. Hann vitjaði tí javnan og til øll serlig tiltøk sum vóru í bygdini, ella til frama fyri eitt hvørt í bygdini, møtti hann upp og stuðlaði. Hann var til allar nýggjársveitslurnar og stuðlaði hesum við undirhaldi og á annan hátt. Orsøkin til luttøkuna, var ikki veitslan sjálv, men gleðin at koma saman við bygdarfólkinum og øðrum við tilknýti til bygdina og síðst men ikki minst viljin at stuðla og halda uppi hesum tiltaki, sum hevur verið fastur táttur í bygdini seinastu nógvu árini. Nú bygdin minkar og færri eru at skipa fyri veitslunum, samskiftu vit báðir so seint sum hósdagin innan hann andaðist, um møguleikan fyri at skipa fyri einari bygdarveitslu seinni í vetur. Sum altíð var hann til dystin fús og bjóðaði seg fram at hjálpa til. Hetta var sum nevnt seinasta hósdag og ikki grunaði tað meg, at næstu boðini um Birgir skuldu vera, at hann ikki var millum okkara meir.

Nú Birgir er farin, stendur eitt stórt pláss tómt eftir hann. Hetta er galdandi fyri vinir, arbeiðsfelagar og arbeiðspláss hansara, sum við honum hava mist so ótrúliga nógv. Størsti missurin og saknurin er tó hjá øllum tykkum sum stóðu honum næst. Við øllum tykkum havi eg mína djúpastu samkenslu. Nú sorgin nývir sum mest, er ringt at síggja frameftir og finna troyst. Mín vón og ynski skulu tó vera, at eftir tungu og døpru dagarnar fyri framman, finna tit lívsmótið og lívsgleðina aftur.

Við hesum fátøku orðum lýsi eg frið yvir minnið um bygdarmann og góða vin mín Birgir Nónsgjógv.

**Símun**

**Dagurin**

**2. november. Bibiana**, deyð umleið ár 1367. Dóttir ein keisarligan embætismann, Flavianus. Tá ið tað upp, at dótturin var kristin, vórðu øll í húsinum tikin av døgum. Bibiana stendur summastaðni skrivað Viviana.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, sonur og beiggi okkara

**Dávur Gudmundsson Isfeldt**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
29. november 2004, 44 ára gamal.

Farið verður frá Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 19.00 í Vesturkirkjuna.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 4. desember kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Mortan, Maria, Solveig, Gunnhild, Jón og Janus**

Tey, ið vilja minnast Dávur, kunnu lata eina peningagávu til børnini á konto í peningastovnunum.